# Atlants Kolvetni kunnar partaeigarar

Jan Müller

Føroya Oljufelagið er nú farið undir at kunna um virksemi sítt. Felagið hevur latið gera eitt lítið rit í litum, sum verður sent øllum partaeigarum. Blaðið verður prentað í tilsamans 2100 eintøkum.

Í blaðnum, sum Steffansons Hús hevur sett upp, eru fleiri greinar og samrøður. M.a. er samrøða við ein av stovnarunum og nevndarlimunum í Atlants Kolvetni, Mortan Johannesen. Í blaðnum verður annars greitt frá gongdini í felagnum og hvørjar framtíðar ætlaninar eru. Eitt nú hevur felagið í hyggju at seta fleiri fólk til at fara undir uppgávur, sum náttúrliga hoyra einum oljufelag til.

# Nú fara grønlendingar at bora eftir olju og gassi

Herfyri vóru umboð fyri oljufeløgini Statoil og Phillips í Føroyum. Ørindi teirra vóru at lata pening til oljuútbúgving á Fróðskaparsetrinum. Umrøddu feløg, sum arbeiða saman á føroyskum øki, eru eisini samstarvsfeløg í Grønlandi, har tað nú verður farið undir at bora eftir olju og gassi á Fylla banka. Spildurnýggja boriskipið hjá Statoil, Vestnavion, er komið til Grønlands og skal seta borin í hvørja løtu. Hetta er fyrsta boring í Grønlandi av slíkum slag.

Nicholas Wright, sum starvast hjá Phillips sigur, at Statoil og Phillips leggja stóran dent á komandi leiting í Grønlandi og við Føroyar. -Vit hava søguligar orsøkir til at samarbeiða, eitt nú í Norðsjónum, har vit kenna hvør annan sum operatørar á ymsum feltum. So vit síggja fram til eisini at samarbeiða á leiðum, ið liggja ikki so langt frá Norðsjónum.

Wright er fegin um at Phillips og Statoil hava funnið saman í bólk á Føroyaøkinum. Statoil hevur áður arbeitt saman við Mobil, sum nú er vorðið partur av Exxon, sum ikki er við í 1. útbjóðing. -Okkum dámar væl at vera komin inn í Statoilbólkin saman við Veba Oil og Enterprise sigur Nicholas Wright, ið metir teirra bólk sterkan á Føroyaøkinum. John Inderhaug, ið stendur á odda fyri Statoil í Føroyaøkinum, sigur, at feløgini hava brúkt einar 150 mill. kr. higartil til kanningar, so teir eru klárir at bora.

Býti millum feløgini í AMG-bólkinum er nú hetta: Statoil, sum er operatørur, eigur 35%, Phillips 30%, Enterprise 20% og Veba 15%.

# Føroya Kolvetni møguliga í bólk

Jan Müller

Eitt mál, sum mong uttan iva bíða spent eftir at frætta meira um, er hvussu verður við hinum føroyska oljufelagnum, Føroya Kolvetni, hvørs norsku ráðgevarar herfyri fingu fútaforboð at arbeiða víðari fyri føroyska felagið, tí teir máttu ikki brúka vitan frá sínum fyrrv. arbeiðsgevara í 1. føroysku útbjóðingini. Síðani hevur verið gitt, at tað tí fór at vera torført hjá føroyska felagnum í heila tikið at vera við í útbjóðingini. Men leiðslan í føroyska felagnum hevur tó gjørt greitt, at teir ætla at vera við og at roynt verður at fáa samstarv í lag við okkurt av útlendsku samtøkunum. Sosialurin hevur skilt, at tað í løtuni eru samráðingar millum Føroya Kolvetni og ein av bólkunum, sum hevur søkt um loyvi. Um so verður, at hetta verður til nakað, so er mannagongdin helst tann, at Oljumálastýrið fær eina fráboðan um, at Føroya Kolvetni er partur av tí ella tí bólkinum. Tað hevur ikki eydnast at fáa viðmerking frá Føroya Kolvetni.



Danski uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen vitjar inn á gólvið hjá føroyska oljumálaráðharranum Niels Helveg Petersen

# Rósar Oljumálastýrinum

*Hann er ovfarin av, hvussu væl, skjótt og hegnisliga føroyingar hava megnað at byggja uppa eina nútímans oljufyrisiting at fyrireika og standa fyri eini komandi oljuleiting við Føroyar*

Jan Müller

Nú fyrsta leiting eftir olju og gass á føroyska landgrunninum nærkast eru mong eygu vend móti Oljumálastýrinum. Mangir av teimum útlendsku ráðharrunum, sum vitja, leggja tí eisini leiðina framvið nýggju hølunum hjá Oljumálastýrinum fyri at hitta landsstýrismannin í oljumálum og har fáa innlit í arbeiðið, sum verður gjørt.

Ein tílíkur ráðharri, sum vitjaði Oljumálastýrið herfyri, var danski uttanríkisráðharrin, Niels Helveg Petersen.

Eftir fundin við Eyðun Elttør spurdu vit hann, hvat hann fekk burtur!

-Eg eri ikki sørt ovfarin av, hvussu væl tit hava megnað at byggja eina slíka nýggja umsiting upp. Og ikki hava tit bara fingið eina fysiska umsiting, sum kann avgreiða spurningar, mær tykir, at tit her hava fingið eina fyrisiting, sum hevur gott skil á tí hon tekst við.

Danski uttanríkisráðharrin sigur seg hava fingið eina sera áhugaverda frágreiðing. -Eg havi varhugan av, at her verður gjørt eitt dygdargott arbeiði, og tað hevur eisini stóran týdning, tá farið verður undir eitt so stórt og nýtt tiltak sum at leita eftir olju og gassi.

Hóast oljufeløgini eru risastórar multinationalar fyritøkur, sum kunnu kennast í so stórar eftir føroyskum viðurskiftum, so heldur danski uttanríkisráðharrin ikki, at føroyingar nýtast at bera ótta fyri hesi nýggju innrásini uttanífrá. -Eg ivist onga løtu í, eftir at hava tosað við fólkini í Oljumálastýrinum, at tit fara at duga at brúka royndirnar, sum vit í Danmark og teir í Bretlandi og Noregi hava gjørt sær á oljuøkinum. Tað aðrir longu hava gjørt meti eg kunna koma tykkum til góðar nú. Nettupp tí síggi eg føroysku fyrisitingina sum eitt gott grundarlag.

Danski uttanríkisráðharrin metir út frá hesum, at føroyingar eru tilreiðar til at fara undir eina komandi leiting.

Meðan føroyingar hava valt at sjálvir at yvirtaka ráevnini í undirgrundini og sjálvir standa fyri allar fyrisiting og arbeiði hesum viðvíkjandi, so hava grønlendingar valt eina aðra loysn, sum ber í sær, at danir og grønlendingar eru í felag um málsøkið. Danski uttanríkisráðharrin sigur uppá fyrispurning at ynskja grønlendingar eina „føroyska“ loysn, so eru teir sjálvandi tilreiðar at tosa um tað. Men hann heldur verandi skipan teirra millum er góð.

Annars er Niels Helveg Petersen fegin um tað samarbeiði, sum er millum føroyskar myndugleikar og GEUS. Í dag hjálpa fleiri jarðfrøðingar og geofysikarar frá GEUS føroysku starvsbrøðrunum og -systrunum í tí týðandi arbeiðinum at tryggja eina góða útbjóðing bæði fyri Føroyar og fyri oljufeløgini.

Vit spurdu danska ráðharran, hvat hann hevur at siga til, at danska oljufelagið Mærsk Olie og Gas ikki er við í oljuleitingini við Føroyar!

-Teir taka sína avgerðir út frá egnum áhugamálum. Teir hava so eisini klárað seg væl í hesi vinnu. At teir so hava mett, at leitingin við Føroyar á djúpum vatni ikki í løtuni hóskar inn í teirra virksemi, er so teirra avgerð og hana mugu vit virða. Annars heldur Niels Helveg Petersen, at tað er gott, at hitt danska oljufelagið DONG, er við í leitingini við Føroyar. Tað er so í tráð við teirra virksemi og ætlanir um at vera við á djúpum vatni bæði við Føroyar og Grønland.

Danski uttanríkisráðharrin viðgongur annars, at verður olja funnin við Føroyar, so fer hon at hava stóra ávirkan á samfelagið.

-Tit eru ein tjóð, sum næstan bara livir av fiski, og tí kann tað vera gott at fáa okkurt annað bein at standa á eisini. Ein slík vinna kann sjálvandi eisini hava óhepnar avleiðingar, men eg ivist ikki í, at føroyingar fara at megna ta umstilling og tær broytingar, sum hetta krevur.

**Fundir við oljufeløg**

Týsdagin fór Oljumálastýrið undir eina røð av fundum og samrøðum við øll tey oljufeløgini, sum hava søkt um loyvi at bora eftir olju á landgrunninum. Fyrsta oljusamtakið, sum varð á fundi við føroyskar myndugleikar var Texaco-samtakið. Í gjár kom túrurin til Norsk Hydro samtakið og soleiðis verður hildið eina viku aftrat.



*Ein av ovastu stjórunum í Texaco Bill Maloney hittir Eyðun Elttør, landsstýrismann í oljumálum, áðrenn hann skal til at greiða frá, hvussu samtakið m.a. ætlar sær at greiða trygdar- og umhvørvisspurningar í sambandi við komandi leiting*



# Saltgoymslan í Runavík klár í september

*Arbei›i› hjá Eimskip at gera n‡ggja saltgoymslu í Runavík ver›ur skjótt li›ugt, og hon ver›ur klár at taka í n‡tlsu í september*

Stefan í Skorini

Saltsølan í Havn fær nú veruliga kapping frá Eimskip, sum fer at ví›ka um sítt virksemi í Føroyum. Eimskip brynjar seg út í Føroyum og fer nú eisini undir at selja salt.

Runavíkar Kommuna hevur ví›ka› um havnaøki› inn ímóti Glyvrum, so at pláss nú eisini er fyri saltgoymsluni, og Eimskip leigar øki› frá kommununi.

Linda Gunnlaugsdóttir, stjóri í Eimskip í Føroyum, sigur, at grundin til at bygt var› í Runavík er, at nógv virksemi vi› saltfiski er í økinum, og tí liggur goymslan sera væl fyri.

Salti›, sum kemur hendavegin, er úr Bahamas. Størsti parturin av saltinum frá Bahamas fer til Íslands, me›an restirnar koma til Føroyar til saltgoymsluna inni í Runavík.

Eimskip fer eisini í næstum undir at byggja ein n‡ggjan skrivstovubygning Yviri vi› Strond í Havn. Hesin bygningur skal byggjast vi› sí›una av bygninginum hjá Føroya Sparikassa. Hetta arbei›i› byrjar í september ella oktober.



*Eimskip brynjar seg nú út í Føroyum, og saltgoymslan inni í Runavík ver›ur klár at taka í n‡tslu í september*
Mynd: Jonhard Hammer

# Skrá fyri Vestanstevnuna 2000 í Vestmanna

**Hósdagur 13. juli**

| | | |
|---|---|---|
| 17.00–21.15 | Hondbóltur fyri yngru deildirnar | |
| 17.00 | gentur 10 | VÍF-Søljan |
| 17.30 | dreingir 10 | VÍF-SÍF |
| 18.00 | gentur 12 | VÍF-Søljan |
| 18.30 | dreingir 12 | VÍF-SÍF |
| 19.00 | gentur 14 | VÍF-STÍF |
| 19.45 | dreingir 14 | VÍF-STÍF |
| 20.30 | gentur 16 | VÍF - STÍF |
| 18.00–24.00 | Fa. »Watersport« skipar fyri sigling við vatnskutarum | |
| 19.00 | Opið hús í Dansistovuni | |

**Fríggjadagur 14. juli**

| | |
|---|---|
| 18.00 | Tivoli letur upp á økinum við Ítróttarhøllina |
| 18.00 | Rodeo mekaniskur hestur og hoppiborg á økinum við Ítróttarhøllina |
| 18.00–24.00 | Fa. »Watersport« skipar fyri sigling við vatnskutarum |
| 19.00–21.00 | Fimleikarhøllin: Agnar Nielsen opnar framsýningina »Gomlu kirkjurnar í Føroyum«, J. P. Gregoriussen greiðir frá og sangkór syngur |
| 19.00 | Opið hús í Dansistovuni |
| 19.30 | Kular røtur hava konsert í Ítróttarhøllini, Trøllapætur verður at hitta |
| 20.30 | Vestanstevnuteiti í Skúlaauluni |
| 22.00 | Saron hevur útimøti á Torginum, opið hús verður í Saron aftaná |
| 23.00 | Dansur í Ítróttarhøllini, »All that rain« spælir |

**Leygardagur 15. juli**

| | |
|---|---|
| 10.00–14.00 | Fa. »Watersport« skipar fyri sigling við vatnskutarum |
| 12.00–13.00 | MBM - rennikapping: Runnið verður eftir niðara veg og runt keiøkið |
| 12.00 | Renning fyri børn: Tilmelding fer fram hálvan tíma áðrenn við Sparikassan |
| 12.30 | Renning fyri vaksin: Tilmelding fer fram hálvan tíma áðrenn við Sparikassan |
| 13.00–14.30 | Súkklukapping: Súkklað verður eftir niðara veg og runt keiøkið. |
| 13.00 | Súkklukapping fyri børn: Tilmelding fer fram hálvan tíma áðrenn við Sparikassan |
| 13.30 | Súkklukapping - Grand Prix fyri vaksin |
| 13.45 | Ítróttarfólk, tónleikarar og „CISV-barnalegur“ ganga skrúðgongu úr skúlanum oman á Torgið |
| 14.00 | Stevnan verður sett á Torginum av Gunn Joensen, bygdarráðsform., hornorkestrið spælir og sangkórið syngur |
| 14.30 | Opið hús í Dansistovuni |
| 14.30–22.00 | Undirhúsið hevur opið |
| 14.00–18.00 | Tivoli er opið á keiøkinum - inni á Atlantis |
| 14.30–18.00 | Kaffisøla í missiónshúsinum |
| 14.30 | Kappróður millum gomul 6-mannafør |
| 15.00 | FM - Kappróður |
| 17.00 | (eftir róðurin) Steypahandan við Undirhúsið, Hans Joh. á Brúgv handar steypini |
| 17.00–19.00 | Fimleikarhøllin: Framsýning um gomlu kirkjurnar í Føroyum |
| 17.30–19.30 | Nýggi og gamli brandbilurin verða vístir fram á parkeringsøkinum við sýsluskrivstovuna |
| 18.00–22.00 | Listaframsýning á balkongini í miðhøllini í nýggja skúla |
| 18.00 | Go-cart koyring á vøllinum inni á Fjør |
| 18.00–24.00 | Fa. »Watersport« skipar fyri sigling við vatnskutarum |
| 18.00–21.00 | Ponyríðing inni á Fjør |
| 18.30–24.00 | Tivoli á økinum við Ítróttarhøllina |
| 18.30–24.00 | Rodeo mekaniskur hestur og hoppiborg á økinum við Ítróttarhøllina |
| 18.30 | Hondbóltur: 1. deild menn - VÍF-Kyndil Steypadystur |
| 20.00 | Hondbóltur: 1. deild kvinnur - VÍF-Neistin Steypadystur |
| 19.00 | Tombola í miðhøllini, kirkjukórið skipar fyri |
| 20.00 | Missiónshúsið hevur útimøti á torginum - aftaná verður opið hús í missiónshúsinum |
| 21.00 | Saron hevur útimøti/sangløtu á torginum |
| 23.00 | Felagssangur á torginum |
| 23.30 | Midnáttarrøða á Torginum. Niels Pedersen flytur fram røðu |
| 24.00 | Dansur í Ítróttarhøllini, »Moon Shot« spælir |

**Sunnudagur 16. juli**

| | |
|---|---|
| 11.00 | Guðstænasta í Vestmanna kirkju v/ Marjun Bæk, presti |
| 11.00 | Morgunmøti í Saron |
| 14.00–22.00 | Undirhúsið hevur opið |
| 14.00–22.00 | Listaframsýning á balkongini í miðhøllini í nýggja skúla |
| 14.00 | Undirhald á gomlu hondbóltsplenuni við m.ø. kappkoyring fyri børn í kassabilum. Togtogan millum flakakvinnur: dagvaktin móti kvøldvaktini. Trillubørukoyring og posarenning millum starvsfólk á Vest Pack og í peningastovnunum |
| 14.00–24.00 | Fa. »Watersport« skipar fyri sigling við vatnskutarum |
| 14.30 | Opið hús í Dansistovuni |
| 15.00 | Tivoli á økinum við Ítróttarhøllina |
| 15.00–22.00 | Rodeo mekaniskur hestur og hoppiborg á økinum við Ítróttarhøllina |
| 15.00 | Fólkafundur í viðalundini, tiltakið »HESU-FERÐ« skipar fyri |
| 16.00–19.00 | Fimleikarhøllin: Framsýning um gomlu kirkjurnar í Føroyum |
| 17.00 | Fótbóltur 4. deild menn EB/Streymur - VÍF á vøllinum inni á Fjør, steypadystur |
| 19.00 | Go-cart koyring á vøllinum inni á Fjør |
| 16.00–20.00 | Ponyríðing inni á Fjør |
| 18.00 | Vestanstevnuteiti í Skúlaauluni |
| 19.00 | Møti í missiónshúsinum v/ Una Næs, presti |
| 20.00 | Vestanstevnuteiti í Skúlaauluni |
| 20.00 | Saron hevur útimøti á Torginum |
| 22.00 | Missiónshúsið hevur útimøti á Torginum. Opið hús verður í missiónshúsinum aftaná |
| 23.00 | Dansur í Ítróttarhøllini, »Ólavur Øster band« spælir |

**Í sambandi við Vestanstevnuna koyrir náttbussurin hesar tíðir:**
**Fríggjadagin 14. og leygardagin 15. juli:**
**kl. 23.00 Vestmanna - Tórshavn**
**kl. 24.00 Tórshavn - Vestmanna**
**kl. 05.00 Vestmanna - Tórshavn**
**kl. 06.00 Tórshavn - Vestmanna**

**Tlf. 286254 og 287752**

**Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð bæði kvøldini**